## Tiltak um feskan fisk

26. oktober 2007 skipar Føroya Ráfiskakeyparafelag fyri einum tiltaki fyri fiskivinnuni. Á skránni er handfaring av rávøru við denti á ymiskar kølihættir, superkøling av fiski, logistikkur og sporføri. Granskingarstjórin á íslendska granskingarstovninum Matis Sigurjón Arason og starvsfelagi hansara, Bjørn Margeirson, koma til Føroya at kunna okkum um hetta. Harumframt fer Steinbjørn í Dali at greiða frá royndunum frá at íverkseta elektroniskt sporføri í fiskivinnuni. Somuleiðis fara Jóhanna á Bergi og Magni Arge at kunna um framtíðarætlanir innan flutning av fiskavørum. Tiltakið verður á Hotel Føroyum – og tilmeldingarfreistin er 24. oktober. (www.industry.fo)

## Verkstovur um CE merking

Í samband við, at SamVit 21. september í ár skipaði fyri kunnandi fundi um CE-merking, er skjøtil sett á eina tilgongd har fyritøkur, sum ætlar sær at fáa CE-merkt teirra vørur, eru við. Einar 10 fyritøkur luttóku á fundinum sum var í september um CE-merking. Tær luttakandi fyritøkurnar hava tað til felags, at tær útflyta vørur, sum skulu verða CE merktar. Fyri at ein vøra kann CE merkjast, er neyðugt at fylgja ávísum mannagongdum. Hesar mannagongdir líkjast nógv tí, sum vit kenna frá innaneftirlitsskipanini í fiskivinnuni. Fyri at fyritøkur skulu fáa meira konkret burtur úr, verður skipað fyri nøkrum verkstovum har fyritøkurnar kunnu møtast og arbeiða við sínum egnu vørum, soleiðis at vørurnar kunnu CE merkjast. Verkstovuleiðari verður Nils Thyssen, sum seinastu 20 árini hevur ráðgivið og arbeitt nógv við CE merkingum. Verkstovurnar verða í hølunum hjá SamVit og byrja í viku 43.

## KT-felagið skipar fyri skeiði í Agile

29. oktober 2007 skipar KT-felagið fyri skeiði í Agile. Skeiðið verður á Hotel Føroyum. Agile er ein samanrenning av hugskotum frá menning av ritbúnaði, vørum og leiðslustýring. Agile tryggjar, at verkætlanir røkka handilsligu málini. Fleiri metodir byggja á meginreglur frá Agile, millum annað Scrum og eXtreme Programming. Skeiðshaldari er Pétur Orri Sæmundsen. Petur er íverksetari, og saman við øðrum hevur hann stovnað íslendsku fyritøkuna Sprettur, sum arbeiðir og ráðgevur innan Agile. Sprettur arbeiðir við Agile hjá m. a. Kaupthing Bank, Nova og Síminn. Petur hevur harafturat royndir innan menning av ritbúnaði, sum deildarleiðari, verkætlanarleiðari og tekniskur leiðari. Skeiðið verður á Hotel Føroyum og tilmeldingarfreistin er 22. oktober 2007 á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum www.industry.fo




*Frystitrolarin Örfirisey gjørdi royndirnar við at skila fisk í trolinum*
(Mynd: Vísir)

# Royna at skilja fiskin í trolinum

**Teir seinastu dagarnar hevur ein íslendskur trolari roynt at skilja tosk og hýsu frá hvør øðrum longu i trolinum**

FISKIVINNA
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Ber tað til at skilja tosk og hýsu frá hvør øðrum longu í trolinum, soleiðis at toskurin fer fyri seg í posan og hýsan fyri seg? Hesin spurningurin hevur verið umrøddur í mong ár, og í fleiri londum eru royndir gjørdar at skilja hesi bæði fiskaskøgini sundur, áðrenn tey koma inn á dekkið. Nú hava íslendingar gjørt enn eina roynd.

Við frystitrolaranum Örfirisey vóru menn í Ísafjarðardýpinum og royndu við botntroli. Hetta var tó ikki eitt vanligt trol. Tað var býtt sundur í tvey við einum neti, sum býtti trolið í ein ovara og ein niðara part, soleiðis at fiskur, sum heldur seg í erva í trolinum, fór í aðra helvtina av posanum, meðan fiskur, sum heldur seg í neðra í trolinum, dór í hin partin av posanum. Málið var at skilja tosk og hýsa frá hvør øðrum, tí tey hava ikki somu atferð, tá tey koma í trolið.

Havrannsóknarstovnurin, sum skipaði fyri royndunum, sigur, at ætlanin er at halda fram við ymsum royndum teir næstu mánaðarnar. Millum annað er ætlanin at royna ymsar meskavíddir har afturi í trolinum við tí fyri eyga at skilja smáa hýsu og smáfisk frá, áðrenn fiskurin kemur aftur í posan.

Havrannsóknarstovnurin í Reykjavík sigur, at ein væl virkandi skipan, sum skilir fiskin longu í trolinum, kann fáa stóran týdning fyri fiskiskapin undir Íslandi, soleiðis sum støðan hjá toskastovninum og hýsustovninum er í løtuni.



*Toskastovnurin er illa fyri, og tí er umráðandi, at hann verður rætt troyttur* (Mynd: Vísir)